## Le Clézio vinnur Nobelprísin



Nobelprísurin í bókmentum fer í ár til Fraklands. Tað er franski rithøvundurin Jean-Marie Gustave Le Clézio, sum á miðdegi í dag fekk handaðan prísin. Franskmaðurin fær prísin millum annað tí hann er »rithøvundur av nýggjum genrum, poetiskum eventuri og sensuellum ekstasum«. Við heiðrinum fylgja eisini 10 milliónir svenskar krónur. Le Clézio 23 føddur 13. apríl 1940 í Nice. Foreldrini vóru enskir statsborgarar, og hansara fyrsta skaldsøga kom út í 1963 og nevndist »Frágreiðing um Adam«.

## Kursirnir á veg upp

C20-indeksið yvir 20 tær størstu børsskrásettu fyritøkurnar í Danmark lá á miðdegi trý prosent hægri enn í gjár. Harvið hava kursirnir ligið í pluss síðani handilin byrjaði í morgun. Tað merkir, at næstan allar fyritøkurnar í indeksinum hava havt framgongd. Enntá stóru bankarnir, sum seinastu dagarnar hava upplivað stórt fall, hava framgongd í dag. Nordea gongur fram við 5% og Danske Bank við 4%. Bert Vestas av teimum 20 størstu fyritøkunum gongur aftur við einum prosenti.

# Árabátur sakk í Lítlu Dímun

**Tað tók einar tveir tímar at fáa seyðin av Lítlu Dímun og umborð á Jóhonnu í morgun. Líkindini vóru vánalig og tann eini árabáturin, sum skuldi brúkast til flutning millum land og skip, varð tikin av eini hvirlu, holvdist og sakk**

HEYSTFJØLL
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



Í gjáramorgunin fóru einir 32 mans út í Lítlu Dímun á fjall. Líkindini vóru ivasom, og sum dagurin leið, vísti tað seg, at menninir sluppu ikki av aftur oynni, tí ókyrra var í sjónum.

Fjallmenninir hava tí ligið veðurfastir á Lítlu Dímun í nátt, men í morgun fóru teir so undir at fáa seyðin av oynni.

### Glaðustrok

Hermann Olsen, sum eigur eina hálva gyllin í Lítlu Dímun, sigur, at líkindini í morgun heldur ikki hava verið nakað serlig, men heldur vánalig.

- Hann hevur verið meira sunnan í ættini í morgun. Tað hevur verið frískur vindur, og stundum er glaðustrok. Jóhanna hevur ligið úti fyri klettinum og hevur tikið ímóti seyðinum. At føra seyðin millum land og skip brúka vit vanliga árabátar, men í morgun tók ein hvirla tann eina bátin, sum holvdist og sakk. Báturin hongur nú uppi í Jóhonnu.

Hermann sigur, at hvørki fólk ella seyður var í bátinum, tá hendingin fór fram.

Tá Sosialurin frætti av Lítlu Dímun um 11-tíðina í morgun, høvdu teir umsíðir fingið allan seyðin umborð á Jóhonnu.

- Tað er meira seyður á oynni í ár enn seinasta ár. Talið, sum er tikið til slátururs, er 218. Vit hava tikið 8 seyðir á gyllina, meðan talið vanliga plagar at liggja millum 6 og 7. Eg haldi, at seyðurin er hampiligur, kanska miðal, sigur hann.

Aftrat sluppini Jóhonnu, hevur útróðrarbáturin Báran úr Hvalba eisini siglt ímillum Hvalba og Jóhonnu við fólki.

Hermann sigur, at tað tók einar tveir tímar at fáa allan seyðin av oynni.

### Ikki vandaleyst

- Nú er bara fólkið eftir, og gongst sum ætlað, sleppa vit av oynni í dag. Líkindini eru ikki góð, men heldur vánalig.

*Tað er ikki bara sum at siga tað at vera á fjalli á Lítlu Dímun, tá líkindini ikki eru tey bestu. Nú var so nógv útliðið, at hvalbingar hildu, at seyðurin mátti takast av oynni*

Hann sigur, at tað bøtir um støðuna, at hann er sunnan í ættini, nú fólkið skal flytast av oynni, tí farið verður í bátin har norðuri á oynni.

- Nei, líkindini eru heldur vánalig, men vit vóna, at alt fer at gangast væl. Vit eru allir í bjargingarvestum, tá vit ferðast millum oynna og skip, og tað er sjálvsagt ein tryggleiki í sær sjálvum.

Hermann Olsen sigur, at eitt er at fáa seyð og fólk av oynni, men hann væntar, at Jóhanna ikki fær nakran góðan túr um fjørðin.

- Hvussu verður við árabátinum, sum er sokkin og hongur aftur úr skipinum, vita vit ikki, men siglt verður helst spakaliga heimaftur, leggur hann aftrat.

Í Lítlu Dímun eru tvey hús, og í nátt høvdu teir 32 menninir nóg mikið av mati til náttina og dagin.

# Íslendska fíggjarkreppan ávirkar ikki føroyingar

**- Eg trúgvi einki upp á, at íslendsku bankarnir fara at krevja tey lánini, teir hava í føroyskum fyritøkum, afturgoldin beinanvegin, sigur Sigurd Poulsen, landsbankastjóri**

FÍGGJARKREPPA
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Í gjár yvirtók íslendska stjórnin tveir av trimum teimum størstu bankunum í Íslandi, Landsbankin og Glitnir. Í dag hendi so tað, at eisini størsti bankin í landinum, Kaupthing Banki, hoyknaði undir altjóða fíggjarkreppuni og varð yvirtikin av íslendsku fíggjareftirlitinum.

Hetta hendi hóast bankin hevði fyrireikað seg upp á kreppuna, og hevði minkað um virksemið í Íslandi.

Kaupthing hevði gjøgnum longri tíð fyrireikað seg til niðurgongd í fíggjarmarknaðunum, serliga í Íslandi, eftir at tað gjørdist greitt, at íslendska krónan gjøgnum fleiri ár hevur verið ov sterk, sigur forstjórin í Kaupthing, Sigurður Einarsson við Børsen.

Hann sigur, at kreppan á fíggjarmarknaðunum førdi við sær, at álitið millum bankar hvarv. Harvið gjørdist alt verri at lána pening millum bankarnar, sum eisini tóku framman undan givnar tilsøgnir um kreditt aftur.

Tá tað gjørdist greitt, at triðstørsti bankin í Íslandi, Glitnir Bank, var í trupulleikum, og at íslendska stjórnin ætlaði at yvirtaka 75% av aktivunum í bankanum, útloysti tað eina ketureaktión, sum eingin megnaði at steðga.

### Ávirkar ikki føroyingar

Tað er væl kent, at íslendskir bankar fíggja fyritøkur í Føroyum, og tí er áhugavert



*Sigurd Poulsen, landsbankastjóri*

at vita, hvussu kollapsið í íslendska búskapinum ávirkar her heima hjá okkum.

Men Sigurd Poulsen, landsbankastjóri, sigur, at føroysku fyritøkurnar neyvan hava nakað at óttast.

- Fyritøkur í Føroyum, sum hava lán í íslendskum bankum, hava tað kanska ikki so lætt, men eg trúgvi einki upp á, at bankarnir fara at krevja lánini útgoldin við brestin. Tað hevði merkt, at fyritøkurnar máttu seljast – helst fyri ein undirprís – og so missa bankarnir virði, og tað eru teir neyvan áhugaðir í, sigur Sigurd Poulsen.

Hann sigur, at burtursæð frá, at vit og íslendingar í stóran mun framleiða somu vøru, so er samskiftið millum tjóðirnar annars ikki so stórt.

Landsbankastjórin væntar sostatt, at hóast fíggjarkreppuna í Íslandi og yvirtøkuna hjá íslendsku stjórnini av bankunum, so liggur áhugin hjá teimum framvegis í at varðveita tey virðir, sum teir fíggja – eisini í Føroyum.

So alt í alt fer íslendska fíggjarkreppan ikki at ávirka føroyingar í serliga mun.